**GÓ IR BRÚKTIR BILAR**

| Bilur | Prísur |
|---|---|
| **Nissan Sunny 1,6 Coupé** hvítur, 3 hurðar, árg. 1986, 305.000 km. | 8.000 |
| **Nissan Almera 1,6 SR** grønur, 4 hurðar, árg. 1998, 44.000 km. | 109.000 |
| **Nissan Almera 2,0 Diesel GX** gráur, 4 hurðar, árg. 1997, 151.000 km. | 94.000 |
| **Nissan Almera 2,0 Diesel SR** grønur, 4 hurðar, árg. 1999, 75.000 km. | 125.000 |
| **Nissan Primera 2,0 SLX** gráur, 4 hurðar, árg. 1998. | 135.000 |
| **Nissan Primera 2,0** rey ur, 4 hurðar, árg. 1991, 121.000 km. | 47.000 |
| **Peugeot 306 XS 2,0 St.Car** ljósa bláur, 5 hurðar, árg. 1999. | 130.000 |
| **Peugeot 306 Diesel Aircon** bláur, 4 hurðar, árg. 1999, 47.000 km. | 125.000 |
| **Peugeot 405 GTX 1,9** rey ur, 4 hurðar, árg. 1993, 30.000 km. | 59.000 |
| **Peugeot Expert 1,9 Diesel** rey ur, 4 hurðar, árg. 1995, 60.000 km. | 85.000 |
| **Opel Astra 1,6** bláur, 5 hurðar, árg. 1995, 109.000 km. | 67.000 |
| **Opel Astra 1,7Dtl Wagon** grønur, 4 hurðar, árg. 1997, 108.000 km. | 99.000 |
| **Opel Astra 1,7Dtl Wagon** grønur, 5 hurðar, árg. 1997, 42.000 km. | 105.000 |
| **Opel Astra 1,8 Club Wagon** grønur, 5 hurðar, árg. 1995, 104.000 km. | 70.000 |
| **Opel Astra 1,6 Club** grønur, 4 hurðar, árg. 2000. | 119.000 |
| **Opel Astra 1,4** bláur, 3 hurðar, árg. 1997, 97.000 km. | 70.000 |
| **Opel Astra 1,7TD Wagon** grønur, 5 hurðar, árg. 1995, 99.000 km. | 65.000 |
| **Opel Zafira 2,0 Dti Comfort** gráur, 5 hurðar, árg. 2001, 18.000 km. | 196.000 |
| **Toyota Carina E 1,6 CDX** gráur, 4 hurðar, árg. 1997, 50.000 km. | 117.000 |
| **Toyota Carina E 2,0 DT** hvítur, 4 hurðar, árg. 1997, 243.000 km. | 110.000 |

Bilarnir finnast eisini á:
**www.nissan.fo**

P/F Meinhardt Arge
v/ oyggjarvegin • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

Sosialurin


## VIÐMERKINGAR

# Unga fólkið sleppur ikki heimanífrá


**Fríðálvur Jensen**
*valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymi*




Bústaðartrupulleikin er so stórur at nógv av teimum ungu, sum ynskja at festa búgv, hava ikki møguleika til tess!

Sum eg havi nevnt, nú tað stundar til val, eru tað mong valevnir og flokkar, sum royna at geva sítt boð uppá, hvussu vit fara undir at loysa bústaðartrupulleikan.

Tosar ein við fólk, so vísir tað seg, at bústaðartrupulleikin gongur teimum so nær at lívinum, at fyri mong er støðan heilt ótolandi.

**Húsaprísirmir**
Av tí at útboðið er nógv minni enn eftirspurningurin, eru húsaprísirnir farnir upp á sama støði ella hægri, enn tað var í áttatiárunum.

Hetta ger so tað, at fyri tey ungu, sum skulu festa búgv, er støðan rættiliga ómøgulig, og gera prísirnir, at hesi gerast trælir í egnum húsum.

Hetta sigi eg, tí tað skal meira enn ein inntøka í kassan, fyri at kunna gjalda rentur og avdráttir, og so kann tað ikki sigast annað enn, at hesi ungu skulu knógva undir slíkari byrðu, at dagligdagurin gerst rættiliga strævin og trupul.

**Alternativ bygging**
Vit mugu tí fara at leggja ein politikk tilrættis, soleiðis at vit kunnu fara undir alternativa bygging, og at tað almenna stuðlar undir hesum, við at vit broyta lógina viðvíkjandi rentustuðlinum soleiðis, at tey ið ynskja at leiga fáa stuðul, og at meirvirðisgjaldið verður lækkað ella tikið burtur í sambandi við slíka bygging.

Húsalánsgrunnurin skal fáa teir heimildir, sum skulu til, soleiðis at grunnurin kann fara undir tær ætlanir, ið vórðu lagdar fyri Føroya fólk herfyri.

Viljin er at fara undir at leggja ein politikk tilrættis á økinum, tí nú er støðan so katastrofal, at hendir onki, er stórur vandi fyri, at unga fólkið, sum er uttanlanda ikki sleppir heim, og at unga fólkið her á landi – flýggjar.

**Tín stuðul skal til**
Skal hetta lata seg gera, er tað sjálvandi neyðugt, at tit stuðla okkum, sum vilja fara undir hetta arbeiðið, so – tín atkvøða er tað sama sum tín stuðul til alternativa bygging!

# Ríkisfelagskapur = bygdamenning! Fullveldi = miðsavnan!


**Páll Poulsen**
*Valevni Sambandsfloksins í Norðstreymoy*




Fullvelstisstuðlanir leggja stóran dent á at nýta grannalandið Ísland sum fyrimynd, um Føroyar gerast eitt fullveldi. Men, fólk í útjaðaraøkjunum í Føroyum, kunnu eisini nýta Ìsland sum eina ræðumynd, um tey ætla sær at velja loysingarflokkarnar! Tí um bústaðarmynstrið í Ìslandi skal verða fyrimyndin fyri einum føroyskum fullveldi, so hevur útjaðarin í Føroyum onki gott í vænti. Í Føroyum býr umleið ein triðingur av fólkinum í høvusstaðnum. Í Íslandi búgva tveir triðjingar av landsins íbúgvum í høvuðsstaðnum.

Uttan mun til hvat vit annars halda um ríkisveitingina, so eru øll samd um, at tað er orsaka av ríkisveitingini (blokkinum), at Føroyar í dag hava eitt livistøði, ið er ájavnt við hini Norðurlondini. Tað er heilt greitt orsaka av ríkisveitingini, at vit hava megnað at ment samferðslukervið til frama fyri útjagaraøkjini, og at vit – til dømis - hava, framhaldsskúlar, sjúkrahús og røktarheim í Suðuroynni og í Norðuroyggjum.

Tað eru tey, ið harmast um, at vit ikki fingu fullveldið beinanvegin aftaná nógv umrøddu fólkaatkvøðuna 14. septembur. Ja, kannska ? Men um so var, at vit høvdu fingið fullveldi tá, so vóru ongir útoyggjaveljarar í dag! Búðu nú eini 25 túsund fólk í Føroyum, og 15 túsund av teimum helst í Tórshavn, so vóru Føroyar ikki tað framkomna landið tær eru í dag - gamla Dronning Alexandrines Hospital hevði framvegis hokið úti í Sandagerði, og fróðskaparsetur, miðnámsskúlar, norðurlandahús, Smyrlar, tyrlur, vegir, brýr, berghol og undirsjóvartunnlar, høvdu bara funnist í hugaheiminum hjá einum doyggjandi ættarliði av fullveldisfólkum.

Uttan ríkisveitingina, sum eina trygga inntøku í upp- og niðurgangstíðum hevði ein rættuliga stórur partur av teimum stovnum og tænastum, vit í dag rokna sum ein sjálvfylgja, ikki verið ein veruleiki. Eitt annað er so, um vit altíð hava sýnt ríkjisveitingini virðing, og nýtt hana rætt! Tað kunnu vit ikki lasta dønum, men bara okkum sjálvum!

Sambandsflokkurin fer at gera alt fyri at útjagarin og bygdamenningin ikki verður offrað á fullveldisaltarnum! Og tí velja Norðstreymoyingar, sum eina sjálvfylgju SAMBANDSFLOKKIN.

# Áheitan til tey eldru!


**Hanna Jensen**
*løgtingsvalevni fyri Fólkaflokkin í Eysturoynni*


Nú Útvarp Føroya, mánakvøldið tann 18. mars, kunngjørdi, at ein veljarakanning vísti, at tað eru tey eldru, sum vilja ríkisfelagsskap og tey ungu fullveldi, so fóru nógvir tankar ígjøgnum mítt høvd.

Hetta samsvarar við tann veruleika, at ung, sum heild, hava áræði, og at tey eldru byrja at stúra fyri hvørji mótbrekku.

Men eg má spyrja: Duga føroyingar ikki at taka sær av sínum eldru og gomlu? Og ætla teir ikki tað, tá land teirra gerst sjálvstøðugt?

Hvør kann halda, at danir skulu gjalda fyri okkara uppihald í aldurdóminum?

Og hvør er trygdin í, at mínir javnaldrar í Keypmannahavn skulu gjalda fyri, og óbeinleiðis taka avgerðir um, hvussu t.d. omma mín skal hava tað her í Føroyum?

Eg skilji als ikki hendan hugsunarhátt, men meti, at tað kann bert gerast betur, jú meiri vit gera sjálv.

Og eg vil hjartaliga heita á tykkum eldru, tykkum gomlu: Gevið hesum unga ættarliðnum møguleikan fyri tí, sum tit ikki fingu møguleikan fyri. Latið tey sleppa at royna seg- at taka við allari ábyrgd í hesum landi, sum vit øll eiga og eru góð við.

Veljið ein flokk, sum vil fult sjálvstýri.

Ein flokk, sum stendur á odda fyri tí tryggu sjálvstýristilgongdini.

Tann flokkin, sum hvørki ætlar at innlima føroyar í danska ríkið við tað sama - ei heldur kvetta í morgin, men sum arbeiðir fram ímóti búskaparligum sjálvbjargni fyrst - so fólkið hevur eitt satt val, tá fólkaatkvøðan verður hildin.

Henda flokk, sum vil gera tað gott at liva í Føroyum - ikki minst fyri tey eldru.

Vísi okkum ungu álit. Vit ætla at gera okkara besta. Og vit hava trúgv á, at tað fer at bera til.

Havið tit eisini tað!



## VIÐMERKINGAR

# Fullveldis IOC-politikkur


**Schandorff Vang**
*Formaður og alttjóða dómari Bogaskjótideildin (limur í ÍSF, IGA, NBU, EMAU og FITA – bert IOC manglar)*




Fimmarin mikudagin í farnu viku var sum eg væntaði merktur av nógvum fullveldis politikki.

Finnur Helmsdal royndi á sín diskreta hátt, men tá Sjúrður Skaale og Leivur Hansen fingu folda seg út, skein púrasta greitt ígjøgnum, hvat ætlanin var við hesi sending.

Ein nevndi um, hvussu skjótt "Jugoslavisku" landspartarnir fingu limaskap. Har haldi eg støðan var heilt ein onnur enn í Føroyum. Jugoslavia sindraðist av kríggi – vónandi er tað ikki tann støðan fullveldisfólkið bíðar eftir.

Sum rættir fullveldismenn stardu teir seg fastan í "Chartrinum", sum vísti á "independant state". Tó hoyrdu vit Finn siga, at nøkur lond vóru komin við sum undantak.

Vil tað so ikki siga, at tulkingin av "independant state" er opin fyri, at vit eisini kunnu koma uppá tal sum limur í IOC? Jú – tað vildi eg meint!

At endurtaka alla sendingina loysir seg ikki, men tá ÍSF-forsetin, sum talar søk ÍSF's, t.v.s. søk hjá øllum ítróttarfeløgumnum og øllum Føroya ungdómi, sum íðkar ítrótt, verður lagdur undir at grugga hetta mál ístaðin fyri at arbeiða miðvíst móti limaskapi, so fara teir skeivir.

Tit fullveldisfólk eru tey, sum grugga málið og royna at spenna bein – og útnytta hetta í loysingarstríðnum.

**Hvat er hent?**
Lat okkum hyggja at gomlu Olympisku nevndini í Føroyum.

At spyrja, hví gongd er komin á málið júst nú er í lagi, men so eigur eisini at verða spurt um, hvussu skipanin hevur koyrt frá byrjan til dagin í dag.

OL-nevndin hevur verið vald í samráð við ÍSF, men hevur arbeitt fullkomuliga uttanfyri stjórn íSF's, t.v.s. at ÍSF bókstaviliga onki hevur havt at siga. Hesar nevndir hava passað seg sjálvar uttan at lata nakran kunna blanda seg. Ikki fyrr enn stjórnin eftir forsetaskiftið í IOC hevur endursæð møguleikan fyri at taka umsóknina fram aftur, er arbeiðið ment meira. Lagt er upp til lógarbroytingar og fann tann sitandi OL-nevndin útav at leggja frá sær.

Sjálvur kom eg inn í stjórn ÍSF's í 1997 og havi eg fleiri ferðir spurt um arbeiðið í OL-nevndini o.s.fr., men har hevur verið púra deytt.

Tað er heilt greitt – síðan starvsnevnd ÍSF's tók yvir er gongd komin á av álvara.

Hvør sat í hesi síðstu nevnd, sum fekk so lítið av skafti?

Magni Arge var formaður og Finnur Helmsdal var nevndarlimur.

Eg ætli mær ikki at skíra nakað politiskt, men tá man sær hesi nøvn, kann man freistast at trúgva, at hugsanin eisini hevur verið politisk, men lat tað liggja.

Men hvat gjørdi henda nevnd?

Hóast fyrispurningar í stjórn ÍSF's, havi eg tann dag í dag bert sæð ein faldara frá 1992 av tí arbeiði OL-nevndin hevur fram – hvat annað hevur OL-nevndin framt?

Munurin í dag er tann, at innanhýsis í stjórn ÍSF's er nógv hent, sum hvørki Finnur Helmsdal ella aðrir atfinnarar vita um. Nógv tilfar er lagt fram og viðgjørt, og fyrst nú vita vit nógv meiri í mun til áðrenn.

So til tykkum mótarbeiðandi fullveldissinnaðu – latið vera at grugga málið.

**Hví limaskpa í IOC?**
Fyrst og fremst fyri at menna ítróttin her á landi.

Vit vita øll, at tað bert verða tey heilt fáu, sum nakrantíð koma so langt, at tey kunnu luttaka til OL.

Men hvat gevur tað øllum hinum ítróttarfólkunum?

Vit fara at fáa stuðul til menning og útbúgving innan ítróttin. Tað fer at geva okkum betri førleika til luttøku millum størri og sterkari lond. Hetta kastar so heilt avgjørt eisini av sær til øll, sum eru kring ta ítróttargreinina, sum fær luttøku og sum roynir at menna teirra ítrótt her á landi.

Henda stuðul fara vit so avgjørt at hava fyri neyðuni – serliga um vit koma undir ólukku fullveldið.

Einasta vón er, at Mentamálastýrið ikki blandar seg her eisini, fyri at taka burtur av tí, sum ÍSF skavar inn til sínar limir, eins og gjørt varð við veddingarpengarnar.

**OL-viðurkenning og fullveldi**
Tað kann vera, at nógv ung hoyra til fullveldisveingin, men mín áheitan er: - halt politikk og ítrótt frá hvørjum øðrum.

Latið vera við at velja nakran fullveldisflokk bert fyri at fáa IOC-limaskap, tí tað er reinur galskapur.

Sjálvandi megna vit at fáa limaskap uttan fullveldi!

Latið vera við at hoppa uppá, at onkrar fullveldishetjur hava funnið ein "Charter", sum hevur nakað í sær, sum kanska kann krevja fullveldi.

Hvussu nógvir "chartrar" eru ikki?

Hvussu nógvar "Bi-Laws" eru ikki?

Hvussu nógv "Appendix" eru ikki?

Tað er har allir krókarnir eru, sum vit skulu leita í – uttan fullveldi.

# Virðiligur eldrapolitikkur er ikki grenj og útgjaring!!


**Sigfríður Dam Olsen**
*valevni í Vágum*


Eitt av álvarsmálunum, sum ein komandi samgonga má og skal fremja, er at betra tær út av lagi vánaligu umstøðurnar hjá alt ov mongum av okkara eldra fólki.

Ofta verður kastað Javnaðarflokkinum fyri, at hann tosar og hugsar ov nógv um "neyð og vesaldóm" !! Løgið, er tað verðuliga so, at tað bert eru javnaðarfólk, ið geva sær far um hesi viðurskifti?

– Neyvan, men tað undrar mong, at tann meiriluti, ið rátt hevur seinastu fýra árini og sum hevur vitað um støðuna, lítið, fyri ikki at siga einki, hevur gjørt til bata á hesum øki.

Í Degi og Viku og í øðrum sjónvarpssendingum um eldraviðurskifti, hava javnan verið samrøður við fólk, ið hava víst á hesar trupulleikar. Og í farnu viku var ein sigandi samrøða við Rigmor Thomsen, pensioneraða sjúkrasystir úr Norðagøtu. Hon helt, at ráðandi myndugleikarnir, ið eru vitandi um støðuna, høvdu mist ábyrgdarkensluna yvir fyri okkara eldru samborgarum, sum eitt heilt lív hava stríðst og bygt upp hetta samfelagið, sum vit njóta gott av. Hon mælti til at fáa eldraverndir, sum skula virka sum núverandi barnaverndir.

Hetta tykir mær at vera eitt sera gott hugskot. Tað eru nógv eldri fólk og onnur við, ið ikki kunna klára seg sjálvi. Fleiri liggja einsamøll so at siga alt samdøgurið. Heimarøktin ger her eitt stórt og gott arbeiði, men játtanin til Heimarøktina má hækka munandi, so at henda fær betur tíð til hvønn einstakan, haraftrat má Heimarøktin útbyggjast, so at møguligt verður við døgnrøkt, har tað er neyðugt.

Uppaftur onnur eru, ið kundu havt tað gott, men sum av øðrum umstøðum ikki fáa frið at liva eitt virðiligt lív undir egnari lon. Her hevði ein eldravernd, sum møguliga kundi verið mannað av kommunulækna, heimasjúkrasystir og øðrum fakfólkum á økinum, verið gull í virði í teimum ymisku viðurskiftunum!!

Virðiligur eldrapolitikkur kostar. Spurningurin er tí, um vit unna okkara eldru samborgarum ein størri part av tí samfelagságóða, sum tey sjálvi í sínari tíð í so stóran mun hava verið við til at skapa??

Jú, vit í Javnaðarflokkinum hava klárt meldað út, vit eru tilreiðar og taka hetta mál í fullum álvara.

Men sera hugstoytandi var tað, at Tjóðveldið (Høgni Hoydal) skírir hetta hjartamál Javnaðarflokksins fyri grenj og útgjaring.

At Tjóðveldisflokkurin við Høgna Hoydal á odda hevur flutt seg sera nógv hugsjónarliga, er eingin loyna, men at framstandandi, lovandi valevni eru farin á hálkubreyt og nærum hava lagt seg hjá Fólkaflokkinum í høgra borði, tað boðar ikki frá góðum.

Eisini hetta fer veljarin at hugsa um, áðrenn hann setur krossin valdagin.

# Fólkapensjónistar ómenniskjaliga viðferð!


**Hans Birgir Hansen**




Tað eru nøkur ár síðani, at ein alment gjørdi vart við, at fólkapensjónistar ikki hava ráð at sita í egnum sethúsum, við tí fólkapensjón hesi fáa í dag.

Tað hevði tí verið eitt gott hugskot um hesi fingu innrættað kjallaran og flutt niður í hendan. So kundu børnini flutt inn í sethúsini hjá foreldrunum.

Tað hevði tá verið møguligt hjá børnunum at selt síni egnu sethús og fingið meira tíð at taka sær av sínum foreldrum, sum hesi hava slept uppá fjall.

Tað ber væl til hjá fólkapensjónistum at flyta niður í kjallaraíbúð og leiga sethúsini út um børnini ikki vilja flyta inn og selja síni sethús.

Tað er stak vánaligt, at leigulógin frá 40-árunum ikki verður endurskoðað av lands-/kommunal politikarum, ið bert hugsa um løtuvinning.

Tað eru slíkar loysnir, okkum tørvar at fáa skipað í Tórshavnar kommunu, ið kann sleppa okkum undan byggjan av ellis- og røktarheimum.

Tað er ein ómenniskjalig viðferð, sum lands-/kommunal politikarar geva fólkapensjónistum undan hvørjum tí einasta løgtings-/kommunuvalið.

Tað hevði verið uppá sítt pláss, at allir fólkapensjónistar fingu innlit/forstáilsi/tilvitan við atliti til politisku stevnuskráirnar.

Tað hevði verið uppá sítt pláss, at allir fólkapensjónistar, ið eru limir í politisku flokkunum, tóku lut í uppstillingarfundunum.

Tað hevði verið uppá sítt pláss at funnið tey fólk, sum tit vilja skulu stilla upp til løgtings-/kommunuvalið hjá politisku flokkunum.

Tað skal verða mín almenna áheitan á allar fólkapensjónistar kring alt landið.

PS: Eg komi aftur til tykkum í blaðnum.